Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Rósa Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Rehabiliteringslóg og rehabiliteringsdepil

Spurningar:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta í verk eina yvirskipaða rehabiliteringslóg, sum fevnir um allar geirar innan rehabilitering?
2. Arbeiðir landsstýrismaðurin fram ímóti at seta á stovn ein rehabiliteringsdepil sum eina samskipaða tvørfakliga heildartænastu til kropsliga, sálarliga og sosiala viðgerð?
3. Um ja, nær og hvussu, og um nei, hvørjar eru grundgevingarnar?
4. Er samstarv millum Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið um nakrar framtíðarætlanir fyri rehabilitering?

Viðmerkingar:
Brúkarin hevur í eitt longri tíðarskeið spurt eftir einum meira skipaðum øki innan rehabilitering við einum greiðum uppgávu-, ábyrgdar- og heimildarbýti millum myndugleikar, ráð, stovnar og sjúkrahús.

Økið er í dag ov óskipað og tí er vandi fyri, at borgarar, ið gerast álvarsliga sjúkir ella skulu til viðlíkahaldsvenjing, detta niðurímillum.

Í svari til fyrispurning frá tingmanninum, Johan Dahl í mai mánað, søgdu bæði landsstýrismaðurin í heilsumálum og landsstýrismaðurin í almannamálum, at ongar ítøkiligar ætlanir vóru at skipa rehabilitering í ein depil.

Sambandsflokkurin hevur síðani skipað fyri almennum kjakfundi um tørvin á rehabilitering í Føroyum, har bæði umboð frá Almannaverkinum og Sjúkrahúsverkinum vórðu boðin við. Niðurstøðan á fundinum var, at hóast økini tosa saman og royna at samstarva, so eru karmarnir als ikki nøktandi til endamálið.

Tað eru harumframt avmarkaðir framtíðarmøguleikar fyri menning í verandi skipan.

Rehabilitering fyrigongur bæði á almannaøkinum og heilsuøkinum, og tí hevur landsstýrismaðurin í heilsumálum fingið ein fyrispurning um sama evnið.

Tað, at okkara rehabilitering í Føroyum virkar væl og effektivt, hevur sera stóran týdning fyri øll tey, sum verða rakt av álvarsligari sjúku og tey avvarðandi - sosialt, fíggjarliga o.a. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 18. oktober 2021

Rósa Samuelsen